# ítróttur

Nr. 10 • Fríggjadagur • 13. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

Neistin-StÍF 20-19 (7-7):

## Neistin hálvkiksaði

**StÍF var heilt nær tí heilt stóru sensatiónini. Men hóast tepra tapið, so standa tær nú við góðum kortum undan seinnu hálvfinaluni móti Neistanum**

**COCA COLA-KAPPINGIN**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Neistin var stórfavorittur. Eisini hóast tær til hendan dystin máttu vera bæði Ásu á Neystabø og Manuelu Stan fyriuttan. Við at fáa StÍF í sín lut, tá hálvfinalurnar í steypakappingini vórðu settar saman, mundu tey flestu halda, at vegurin til finaluna lá víðopin fyri Neistanum.

At spælarar og venjari eisini hildu hetta, tóktist eisini vera ein veruleiki, tá farið varð undir dystin móti StÍF. Eitt nú spegladist hetta aftur í, at Nicoleta R. Hansen sat á beinkinum fyrstu longu løtuna, meðan Annika Ljósstein bert varð nýtt í verjupartinum fyri tað nógva.




*Hóast sigurin, so vóru Neista-kvinnurnar alt annað enn nøgdar eftir dystin mikukvøldið. Og tað vóru tær hjá StÍF kanska heldur ikki. Tí seinastu løtuna kundi sigurin eins væl farið til teirra*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Frusteraðu heimaliðið

Kanska høvdu tær bláu gloymt, at StÍF so sanniliga eisini ætlaði sær nakað burtur úr dystinum. Tær hugsaðu fyrst og fremst um at fáa verjupartin at rigga, og í álopinum royndu tær so at hava ferðina somikið lága, at eingi býttislig mistøk vórðu framd. Og so gjørdi tað ikki støðuna verri at Adela Burcea í málinum hevði ein fínan dag. Nakað sum tó eisini var galdandi fyri Fríðu Petersen í Neistamálinum.

Hetta hóvaði avgjørt ikki Neistanum, sum hevði sera ilt við at fáa nakað glið á sítt spæl. At talvan eftir fyrsta korterið vísti 2-1, mundi eisini bera boð um tað sama, men hóast Neistin seinni fekk betri glið á, so hekk StÍF alla tíðina í.

Tað gjørdu tær eisini í seinna hálvleiki, og sum minuttirnir gingu, gjørdust frustratiónirnar hjá heimaliðnum alt sjónligari. Hóast tær fleiri ferðir hóttu við at renna undan, so megnaði StÍF hvørja ferð at svara aftur. Eisini tá Neistin við seks móti fimm hevði gyltan møguleika at punktera dystin í dystin í seinastu minuttunum. Við 19-17 á talvuni hevði Neistin vunnið sær brotskast. Poula D. Olsen hevði júst fingið tveir minuttir fyri brotið, sum førdi til brotskastið, og so kundi Annika Ljósstein taka spenningin úr dystinum. Hetta eydnaðist tó ikki. Adela bjargaði, og lítla løtu seinni hevði Paula B. Høgnesen ístaðin minkað um munin. Hetta tóktist fullkomuliga at trýsta Neistan niður. Gaman í fingu báðir partar eitt mál afturat í part, men gestirnir mundu iðra seg um, at dysturin ikki varði nakrar minuttir afturat. Soleiðis sum huglagið og kropsmálið hjá Neistanum var hesa seinastu løtuna, so lítktust tær meira einum liði, sum veruliga hevði fingið bank, heldur enn einum liði, sum hóast alt hevur eitt mál at dúva upp á undan seinnu hálvfinaluni.

### Lokal framgongd

Og júst sigurin ger, at tað ikki nýtist at vera nøkur vanlukka fyri Neistan, at tær ikki megnaðu at seta skápið upp á pláss fyrra dystin. Tí enn mugu tær roknast sum favorittar til finalusessin.

Men tað gevur teimum helst høvuðbrýggj, at StÍF skuldi sleppa somikið væl frá uppgerðini mikukvøldið. Tað skapar ein spenning, sum tær hjá Neistanum helst vildu verið fyriuttan, og tí er ikki ilt at ímynda sær, at spælið kann gerast sera fjáltursstungið í seinna dystinum.

Og tað er so eisini væl hugsandi, at StÍF kann taka av, um møguleikin aftur stendur teimum í boði í seinnu hálvfinaluni. Fyri føroyskan hondbólt er eisini hugaligt at síggja, hvussu stór framgongdin hjá liðnum hevur verið seinasta góða árið. Gaman í eru tær enn ikki á einum støði, har tær av álvara kunnu bjóða toppinum av. Men sop skal eisini havast í huga, at tær í løtuni bert nýta eitt pláss av útlendingakvotuni. Við fyrst og fremst at satsa upp á egnar kreftir, tykist felagið vera væl ávegis at byggja eina sterka lokala stammu á liðnum. Eina stammu, sum við eitt lítið sindur av kryddi væl kann hugsast at gera heilt nógv um seg komandi árini.

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-StÍF 20-19 (7-7)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Unn Kragesteen 5, Annika Thomsen 3, Rakul Augustinussen 3, Nicoleta R. Hansen 3, Annika Ljósstein 2, Anna Clementsen 2, Kára á Dunga 1, Mia Káradóttir 1
**StÍF:** Guðrun Ólavsdóttir 5, Paula B. Høgnesen 5(1), Rebekka Justinussen 4(1), Poula D. Olsen 4, Ninna K. Johansen 1
**Brotskøst:** Neistin 2, StÍF 4
**Útvísingar:** Neistin 3, StÍF 3
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen. Høvdu ongantíð trupulleikar, tó at teir onkra ferðina eisini tóktust hava hug at sovna nakað í lágu leikferðini.

### Dystir um vikuskiftið

| dagur | kl. | dystur | dómarar |
|---|---|---|---|
| **Hondbóltur • Coca Cola-kappingin • kvinnur** | | | |
| 14.01 | 15.00 | VB-Stjørnan | Hallur & Petur |
| **Sunset-kappingin • FM-bólkurin** | | | |
| 15.01 | 14.30 | Kyndil-Neistin | Dánjal & Heri |
| 15.01 | 15.00 | Stjørnan-VB | Kristian & Sámal |
| **Niðari bólkurin** | | | |
| 15.01 | 14.30 | VÍF-StÍF | Eyðun & Andreas |
| 15.01 | 15.30 | Søljan-Tjaldur | Kári & Dánjal |
| **Atlantic Airways-kappingin** | | | |
| 15.01 | 16.00 | Kyndil-Neistin | Dánjal & Heri |
| 15.01 | 16.00 | StÍF-KÍF | Rúni & Ragnar |
| 15.01 | 16.00 | VÍF-H71 | Eyðun & Andreas |
| **Flogbóltur • Meistaradeild kvinnur** | | | |
| 14.01 | 17.30 | KÍF-TB | Mjølnir |
| 15.01 | 15.00 | Dráttur-Mjølnir | SÍ |
| **Meistaradeild menn** | | | |
| 14.01 | 15.00 | Fleyr-Mjølnir | Nøvan |
| 14.01 | 16.00 | SÍ-ÍF | Nøvan |

## Nýggjur samskipari

Í heyst kundi Kyndil staðfesta, at felagið hevði styrkt um umsitingina, tí Svein Rógvi Nielsen varð settur í starv sum samskipari. Eftir bara hálvan annan mánað í starvinum, segði Svein Rógvi seg tó úr hesum, men nú kann grøna havnarfelagið so aftur staðfesta, at samskipari er settur. Hesin er samstarvsfelagin hjá Svein Rógva á kvinnulandsliðnum, Flemming Raben. Flemming flutti í 1999 til Føroya við familjuni, og fyrstu árini virkaði hann í Kyndli. Hann hevur eisini vant Neistan í nøkur ár, men í vár fór hann tó av landinum í arbeiðsørindum. Nú er hann tó komin aftur her á klettarnar, og fyribils hevur hann tikið við starvinum sum samskipari. Í fyrstu atløgu er starvssetanin galdandi hetta kappingarárið.

**-mørk**

## Challenge-Trophy verður í Bosnia

Kvinnurnar á hondbóltslandsliðnum ganga ivaleyst í spenningi og bíðað eftir, hvussu tilmelding og lutakast verður til komandi kappingina, sum helst verður spælt í maimánaði. Fyri tveimum árum síðani tóku føroysku kvinnurnar fyri fyrstu ferð lut í kappingini, og tað var við framúr góðum úrslitum.

Í ár verður kappingin hildin í Bosnia, sum fyri seks árum síðani vann Challenge-Trophy kappingina. Síðani tá hevur Bosniska hondbóltssambandið ikki tikið lut í altjóða kapping, men nú verður so lagt til brots aftur hesum viðvíkjandi.

**-mørk**